# Broytingar í privatum tryggingum. Gildiskomudagur 1. januar 2017.

| Trygging | Tryggingartreytir pr. 01.01.2017 | Galdandi áður |
|---|---|---|
| **Ársferðatrygd**<br><br>(ískoytistrygging til Familjutrygd) | **Grein 3.2.2:**<br>Hvør einstøk ferð kann vara upp til **60** dagar. | Var áður 42 dagar. |
| | **Grein 13.1:**<br>Upphæddin fyri endurgjaldskeyp í sambandi við seinkað viðføri er hækkað, og nýggjur dekningur fyri útreiðslur til leigu av útgerð er komin:<br>1. Óbroytt.<br>2. Endurgjaldskeyp í førum, tá innskrivað viðføri kemur meira enn 5 tímar seinni enn tú til ferðamálið uttanlands. Endurgjaldið er kr. **1.200** pr. dag, tó í mesta lagi kr. **4.800**. Endurgjaldið kann tó ongantíð verða hægri enn kr. **9.600** fyri øll ferðandi pr. hending/seinking. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum verður latin Trygd.<br>3. Rímiligar og neyðugar útreiðslur til leigu av samsvarandi útgerð (so sum barnavogni, -stóli, skí- ella golfútgerð), um tín egna er seinkað meira enn 5 tímar eftir, at tú ert komin til ferðamálið uttanlands. Endurgjaldið kann í mesta lagi verða kr. 3.000 pr. persón og kr. 6.000 fyri øll ferðandi pr. hending/seinking. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at váttan um seinkanina frá flutningsfelagnum verður latin Trygd. | 1. Óbroytt.<br>2. Upphæddirnar vóru kr. 800 pr. dag, tó í mesta lagi kr. 3.200.<br><br>3. Nýggjur dekningur. |
| | **Grein 16.1:**<br>Dekningurin er víðkaður til eisini at fevna um óváttaðar eykaútreiðslur, tá tryggjaði er seinkaður á veg **úr** Føroyum:<br><br>Tryggingin fevnir um óváttaðar eykaútreiðslur fyri hvørt byrjað samdøgur, um tryggjaði, eftir galdandi ferðaætlan, er seinkaður meira enn 8 tímar á veg úr Føroyum (ella til Føroya). Endurgjaldið er kr. 1.000 fyri hvørt byrjað samdøgur, tó í mesta lagi kr. 4.000. | Nýggjur dekningur. |
| | **Grein 11:**<br>Hægsta endurgjaldið fyri rættarhjálp er hækkað til kr. **200.000**. | Var áður kr. 75.000. |
| | **Grein 4.3.l:**<br>Hægsta endurgjaldið fyri fysioterapi er hækkað til kr**. 20.000**. | Var áður kr. 15.000. |

| | | |
|---|---|---|
| | **Grein 9:**<br>Hægsta endurgjaldið fyri vanlukkutilburðir er hækkað soleiðis:<br>Deyð: kr. **200.000**<br>100% avlamni: kr. **400.000** | Var áður:<br>Deyð: kr. 150.000<br>100% avlamni: kr. 300.000 |
| | **Grein 16.1:**<br>Endurgjaldið fyri óváttaðar eykaútreiðslur, tá heimferðin **til** Føroya seinkað, er hækkað til:<br>Kr. 1.000 pr. dag,í mesta lagi kr. 4.000 | Var áður:<br>Kr. 800 pr. dag, í mseta lagi kr. 3.200. |
| | **Grein 15.4:**<br>Undantakið í grein 15.4.a) er **strikað**:<br><br>Hetta merkir, at tað ikki longur er eitt krav fyri endurgjaldi fyri eykaútreiðslur, tá tú av óvæntaðum orsøkum og ikki av egnum áðum verður ov seinur til alment flutningsfar, at fyrsti steðgur uttan fyri Føroyar er í minstal lagi 10 tímar.<br><br>Tíðarskeiðið fyri steðgir uttanlands skulu tó altíð í minsta lagi svara til *Minimum Connecting Time* hjá tí floghavn, tú steðgar í. | Var áður:<br>Ferðatryggingin fevnir ikki um:<br>1. Seinkaða framkomu í sambandi við flogfaraskift, um ásett er uppihald á minni enn 10 tímar á fyrsta ferðamáli uttan fyri Føroyar. |
| **Tøkni- og Óhapstrygd**<br><br>(ískoytistryggingar til Familjutrygd): | **Broyttar upphæddir:**<br>1. Sjálvsábygdin fyri hvønn skaða lækkar til kr. **500**.<br>2. Hægsta endurgjald pr. skaðahending hækkar til kr. **25.000**.<br>3. Hægsta endurgjald pr. ár hækkar til kr. **50.000**.<br><br>4. Avskrivingin á el-lutir í **Tøknitrygd** vegna aldur er **strikað**, soleiðis at fult endurgjald nú verður latið fyri lutir upp til 4 ár. | Var áður:<br>1. Sjálvsábyrgdin var kr. 1.000<br>2. Hægsta endurgjald pr. skaðahending var kr. 15.000<br>3. Hægsta endurgjald pr. ár var kr. 25.000<br><br>4. Aldur (ár) — Endurgjald í %<br>0-2 — 100<br>2-3 — 90<br>3-4 — 80 |

## Galdandi fyri allar tryggingar:

**Prístalsjavningin verður framyvir min. 1%**

Prístalsjavningin av tryggingargjaldinum fyri allar okkara tryggingar, undantikið stutttíðartryggingar, verður frá 1. januar 2017 broytt soleiðis, at prísjavningin verður í minsta lagi 1 prosent árliga. Prísirnir verða framvegis javnaðir eftir brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya einaferð um árið til høvuðsforfall á tryggingini. Hækkar brúkaraprístalið minni enn 1 prosent, verður gjaldið tó javnað við 1 prosenti. Verða ongi nýtilig almenn brúkaraprístøl kunngjørd, hevur Trygd rætt til at javna við øðrum grundarlagi.